Ítróttarsambandið fyri Brekað søkir eftir:

Ítróttarráðgevara

(konsulenti) til brekaítróttina í Føroyum.

Ítróttarsambandið fyri Brekað (ÍSB) søkir eftir fólki, sum hevur neyðugu førleikakrøvini at kunna taka á seg ítróttarliga og samskiparliga táttin í arbeiðinum at stuðla upp undir endamálsorðingina hjá ÍSB:

- at menna og fremja rørslu-, uppvenjingar- og kappingarítrótt, ið einaheist viðvíkur støðuni hjá tí brekaða
- at arbeiða fyri at seta á stovn feløg runt landið, og hjálpa og samstarva við verandi ítróttarfeløg, ið taka sær av ítróttini fyri brekað
- at arbeiða fyri samstarvi við skúlar og skúlaítróttina
- at arbeiða fyri, at allur ítróttur innan ÍSB verður íðkaður undir kønari leiðsla og undir góðum umstøðum
- at skipa fyri venjara- og leiðaraútbúgvingarskeiðum
- at bera út kunnleika um brekaítróttina
- at skipa fyri kappingum, ítróttarstevnum og øðrum.

Um tú hevur áhuga at vera við í hesum ítróttarliga menningartiltaki fyri tey brekaðu í landi okkara, so er rætta løtan nú. Ítróttarsambandið fyri Brekað hevur gjørt av at seta ein ítróttarráðgeva (konsulent) í fulltíðarstarv, fyri at røkka so mongum av okkara samfelagsborgarum sum gjørligt. Tilvísing hjá tí, sum sett/ur verður, fer at vera til starvsnevndina hjá ÍSB. Um tú heldur teg til at vera við í hesi fyrstu royndini av sínum slagi her á landi, so ert tú vælkomin at søkja omanfyri nevnda starv


Førleikakrøv:
Prógv frá Læraraskúla, Hægri ítróttarskúla, Petagogskúla ella onnur við øðrum hóskandi fortreytum. Umframt góð samarbeiðsevni krevst góður málkunnleiki í enskum og kunnleiki til TK-tøkni.

Setanarkor:
Eftir nærri avtalu við starvsnevndina í ÍSB. Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum sett/ur verður í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at taka ta eftirútbúgvingtað veri seg petagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving- sum er neyðug fyri at verða sett/ur í starv. Eisini má viðkomandi rokna við í ávísan mun at skula leiða og skipa fyri v. m. á fleiri stigum, og ferðast úti um landið - og partvís um kvøldið um neyðugt. Fasta arbeiðsstaðið verður annars at rokna í ÍSF-húsinum á skrivstovuni hjá ÍSB.

Løn: Sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag ella eftir avtalu.
Leyst at søkja: Tíðin at søkja er úti 20. mars.1999
Vil umsøkjari vita nærri um setanartreytir v. m., so er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við formannin í ÍSB, Jógvan (Egga) Jensen, tlf.311985.

Umsóknin verður at senda til:

Ítróttarsambandið fyri Brekað
Box 223
Gundadalur
FR-110 Tórshavn
Føroyar



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Bára Hansen
Faksagøta 2b
100 Norðasta Horn

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: LOGNARSTILLI

L	A	T	U	M	O	K	K	U	M	B	R	Ú	K	A	
Í	L	A	T		O	O	O			Ó		T	Ó		F
T	D		S	I		S	N	J	A	L	L	A	R		O
L	E	V	I	N	T	S	G	A	N	G	U	R		C	R
I	B	A	R	R	A			S		N	A	M	S	E	N
E	A	R	A	I	N	N	U	M		A	N	A		N	A
I	R	A			G	Ó	V	U		R	Ð	Ð		T	M
N	A	M	I	B	I	A		N	B		A	U		R	A
G	N	A	G	S			Ó	Ð	Ý	R		R	E	A	L
U		Ð		A	R	R			R		T			L	
R	E	U	S			O	T	I		R	O	K	N	I	
191	U	R	I	A	S	P	O	S	T	U	R			S	A
A	R		G		O		L	K		T	A	F	F	E	L
L	O	P	R	A	N	S	E	I	Ð	I		K	I	R	A
A	P		U	G	A	N	D	A		N	A		T	A	Ð
R	A	G	N	A	R		O	S	M	U	N	D	I		I

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ...«** á bjálvan.

Loysunarorðið: **192**
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Barnarímur** - *Hans A. Djurhuus/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt